# Formaðurin takkar fyri seg

**Landsstýrið hevur valt Carl á Lag í nevndina fyri Framtaksgrunnin í staðin fyri Niels Winther Poulsen, ið hevur verið formaður. Niels Winther Poulsen hevur lagt frá sær, tí spurnartekn hevur verið sett við hansara gegni**

ÚTSKIFTING
*Ingi Rasmussen*

Umstríddi formaðurin í Framtaksgrunninum Niels Winther Poulsen, advokatur, hevur gjørt av at leggja frá sær longu eftir einum ári.

Niels Winther Poulsen er valdur av landsstýrinum, og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, hevur í staðin valt Carl á Lag, stjóra í Havn, í nevndina.

Framtaksgrunnurin hevur um dagarnar. Fundurin skuldi eftir ætlan verið týsdagin, men tað eydnaðist ikki at savna nevndina, og tí varð hann útsettur ein dag ella tveir.

Niels Winther Poulsen sigur við Útvarpið, at hann hevur lagt frá sær, tí stórt spurnartekn varð sett við hansara gegni beinanvegin, hann gjørdist formaður. Hetta var tí, at hann sum advokatur í stórum advokatvirki hevði nógv áhugamál at røkja, sum kundu koma tvørt fyri áhugamálini hjá Framtaksgrunninum, varð sagt. Tí metir hann tað vera rættast at velja onkran annan formann, serliga nú farið verður undir einskiljing av Fiskavirking.

Niels Winther Poulsen er annars væl nøgdur við hetta árið, hann hevur verið formaður. Tað hevur verið spennandi og gott, sigur hann, men hann heldur samstundis, at nevndarlimir skuldu verið valdir fyri meira enn eitt ár í senn.

Í nevndini fyri Framtaksgrunnin sita Dagmar Joensen, stjóri, Sjúrður Horsdal, stjóri, Eydna Justinussen, fíggjarráðgevi, og so nývaldi Carl á Lag. Nevndin skal nú velja fimta limin. Hon skipar seg sjálv og velur formann á aðalfundinum.

Carl á Lag er stjóri í altjóða fiskafyritøkuni SN Global. Og tað er ikki hvør sum helst. Umsetningurin hjá SN Global konsernini er umleið 4.000 milliónir krónur. Móðurfelagið heldur til í Japan, og tilsamans starvast 3.000 fólk í fyritøkuni.

Evropeiska høvuðssætið er í Føroyum, her fyritøkan hevur verið síðstu fimm árini. Føroyska felagið hevur dótturfeløg í bæði Fraklandi og Týsklandi, og systirfeløg eru at finna bæði í USA, Kili og Japan.

Framtaksgrunnurin er ein týðandi aktørur í føroyskum vinnulívi og eigur bæði Fiskasøluna og Fiskavirking. Nú er tíðin komin at selja burturav Fiskavirking, heldur fráfarandi formaðurin í nevndini fyri Framtaksgrunnin.



*Carl á Lag er nýggjur nevndarlimur í Framtaksgrunninum. Hann er stjóri fyri altjóða fyritøkuni SN Global*

Mynd: Álvur Haraldsen






Bilar

Nr. 65 • hósdagur • 3. apríl 2003 • 77. árg.

# Nýggjur stjóri á Bilfríðkan

**Bilasølan Bilfríðkan í Havn hevur fingið nýggjan stjóra. Suni Magnussen, ið hevur arbeitt sum sølumaður hjá fyritøkuni í gott eitt ár, er nú stjóri á fyritøkuni, sum eigarin, Ludvík Petersen, stovnaði fyri skjótt 30 árum síðan**

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*



*Ludvík Petersen, v.m., stovnaði Bilfríðkan í 1975. Nú er Suni Magnussen stjóri á fyritøkuni*

Bilfríðkan bleiv stovnað í 1975. Ludvík Petersen byrjaði í garaguni hjá foreldrunum við Velbastaðvegin, har hann umvældi og lakkeraði bilar. Hann hevði tá lært til bilmekanikara hjá Reyni Service í Rættará. Seinni blivu størri virkisbygningar bygdir við bilverkstaði, eykalutagoymslu og framsýningarhølum. Í 80-unum innfluttu teir brúktar bilar, ið blivu settir í stand og seldir. Bilfríðkan hevur fyrr umboðað General Motors, nú eru tað bilmerkini Fiat og BMW.

Nýggi stjórin á Bilfríðkan, Suni Magnussen, er 43 ára gamal. Hann er best kendur sum Suni í Fotobúðini. Suni byrjaði í 1977 í Fotobúðini hjá Sigurð Bech á Áarvegnum í Havn og arbeiddi har í nøkur ár. Hann hevur tó fyrr roynt seg í bilbranchuni, við tað at hann miðskeiðis í 80-unum arbeiddi sum sølumaður á bilasøluni hjá Ivan Johansen. Tá hann hevði verið har í hálvtannað ár, fekk hann tilboð um at yvirtaka Fotobúðina. Men hugurin hevur stóð tó alla tíðina til bilarnar. Fyri einum ári síðan fór Suni aftur at royna seg sum bilasølumann, hesaferð hjá Bilfríðkan. Nú er hann so vorðin stjóri á fyritøkuni. Suni eigur Fotobúðina í Handilshjarnanum og Ludvík Petersen eigur Bilfríðkan.

# Fiat Stilo Multi Wagon

**Eftir at Fiat Stilo hava verið á marknaðinum í gott eitt ár sum hatchback við trimum og fimm hurðum, er nú stationvognurin Multi Wagon komin á marknaðin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Fiat kalla Stilo stationvognin fyri Multi Wagon. Talan er um ein rúmligan bil ið er nakað hægri innan enn hatchback útgávurnar.



Eins og á hatchback útgávunum kann baksetrið flytast aftur og fram, soleiðis at man kann velja í millum at hava stórt viðførisrúm ella gott beinpláss aftan. Viðførisrúmið er 510 litrar, tá baksetrið er flutt heilt aftur. Bilurin fæst við 1,6 og 1,8 litur bensinmotorum og JTD dieselmotorum við ávikavist 80 og 115 hk. Opið hús verður leygardagin 5. apríl frá kl. 10-17, har høvið verður at royna nýggjar bilar og heilsa uppá nýggja stjóran. Eisini verður kaffi og pinnamatur og balónir til børnini.